# Suðuroyar Svimjifelag var nógv best

**SVIMJING** Suðuroyar Svimjifelag vann 18 gullheiðursmerki, 10 silvurheiðursmerki og eina bronsu á FLOT-stevnuni, sum var um vikuskiftið. SuSvim var nógv tað besta felagið

Uni Holm Johannesen

Hetta var ein stevna fyri børn undir 12 ár. Úrslitið er ein greið ábending um, at Suðuroyar Svimjifelag hevur eina spennandi framtíð. Stóra arbeiðið, sum slóðbrótarin Jón Bjarnson og hini í Vági hava lagt í svimjiítróttina gevur av álvara úrslit.

Rói Bech, SuSvim, var besti svimjarin. Hann vann seks gullheiðursmerki. Mest vinnandi gentan var Sára R. Nysted, SuSvim. Hon vann fimm gull og tvær silvur.

## HEIÐURSMERKJABÝTIÐ MILLUM FELØGINI:

| FELAG | GULL | SILVUR | BRONSA |
|---|---|---|---|
| SuSvim | 18 | 10 | 1 |
| HS | 5 | 8 | 2 |
| Reysti | 3 | 5 | 11 |
| FS | 0 | 2 | 5 |
| FLOT | 0 | 1 | 3 |
| Ægir | 0 | 0 | 1 |
| *Tilsamans* | *26* | *26* | *23* |

## HEIÐURSMERKJABÝTIÐ MILLUM SVIMJARAR:

| FELAG | GULL | SILVUR | BRONSA |
|---|---|---|---|
| Rói Bech (2001), SuSvim | 6 | 0 | 0 |
| Sára R. Nysted (2001), SuSvim | 5 | 2 | 0 |
| Húni Vestergaard (1999), SuSvim | 4 | 1 | 1 |
| Vár E. Eidesgaard (2001), HS | 3 | 4 | 0 |
| Torkil Poulsen (1999), Reysti | 3 | 0 | 0 |
| Hugin Næs Lave (2001), SuSvim | 2 | 5 | 0 |
| Birni Sigvardsen (1999), HS | 1 | 4 | 0 |
| HS2 (2000), HS | 1 | 0 | 0 |
| SuSvim 2 (2001), SuSvim | 1 | 0 | 0 |
| Rókur Trygvason (2000), Reysti | 0 | 2 | 1 |
| Maria á Lakjuni (2001), FS | 0 | 1 | 4 |
| Óli Poulsen (1999), Reysti | 0 | 1 | 4 |
| Gundur E. Petersen (2001), FS | 0 | 1 | 1 |
| Bergur Poulsen (2003), Reysti | 0 | 1 | 0 |
| FLOT (1999), FLOT | 0 | 1 | 0 |
| Rani Jacobsen (2001), SuSvim | 0 | 1 | 0 |
| SuSvim 1 (2001), SuSvim | 0 | 1 | 0 |
| Súsanna T. Justinussen (2002), Reysti | 0 | 1 | 0 |
| Julian Hansen (2001), Reysti | 0 | 0 | 3 |
| Áron í Geil (2001), FLOT | 0 | 0 | 1 |
| Durita Svensdóttir (2001), Reysti | 0 | 0 | 1 |
| Ella Peltonen (2001), HS | 0 | 0 | 1 |
| Jákup J. Clementsen (2000), HS | 0 | 0 | 1 |
| Jógvan Petersen (2000), FLOT | 0 | 0 | 1 |
| Jónas Hansen (2002), Reysti | 0 | 0 | 1 |
| Rani Olsen (2001), FLOT | 0 | 0 | 1 |
| Reysti Super Team (0), Reysti | 0 | 0 | 1 |
| Viktoria á Lakjuni (2001), Ægir | 0 | 0 | 1 |
| *Tilsamans* | *26* | *26* | *23* |



*Rebekka Fuglø fær heiðusmerki um hálsin*

# Rebekka er best í kongaríkinum

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR** Rebekka Fuglø vann gullheiðursmerki á 1500 metrum og 800 metrum um vikuskiftið. Marnar Djurhuus stóð seg eisini væl

Uni Holm Johannesen

Rebekka Fuglø kappaðist serliga við Karinu Klok í bólkinum gentur 18-19 ár á 1500 metrum. Tilmeldingartíðirnar boðaðu frá frammanundan, at talan fór helst at vera um tætta kapping. Rebekka legði varliga fyri og rann fyrstu 100 metrarnar upp á 18,5 sekund. Hon setti spakuliga ferðina upp, men Simone Glad, sum hevði bestu tilmeldingartíðina, fór frá øllum, og Karine Klok var nummar tvey. Rebekka var beint aftan fyri, men setti ferðina upp seinastu metrarnar. Seinastu trý umførini økti hon um munin aftur til hinar. Tíðin hjá henni var 4.49.21, og tað er nýtt persónligt met. Tíðin hjá Karinu Klok, sum varð nummar tvey, var 4.59.31.

### Eisini á 800 metrum

Rebekka Fuglø vann eisini danmarksmeistaraheitið á 800 metrum. Tað var leygardagin. Tað vóru bara tvær, sum høvdu meldað seg til í bólkinum gentur 18-19 ár, og tí runnu tær saman við teimum 20-22 ár. Rebekka Fuglø kappaðist móti Karinu Klok, sum rann aftaná føroyinginum so at siga allatíðina.

Tíðin hjá Rebekku var 2,26.18.

### Marnar stóð seg væl

Eisini Marnar Djurhuus stóð seg væl. Hann var triðjur á málið leygardagin í bólkinum 3000 metrar í dreingir 17. Marnar var við millum teir ovastu beinanvegin, men favoritturin Zacharias Grassme, Sparta, fór undan hinum, tá helmingurin var runnin. Marnar dragnaði og hótti ongantíð teir ovastu. Hann kom á málið við tíðini 8,57.35, og vann bronsuheiðursmerki.

Marnar var nummar fýra í kappingini 1500 metrar fyri dreingir 17 í gjár.

Tað var triðju árið upp í slag, at íðkarar úr Treysti er við til danmarksmeistarakappingina fyri ung. Fyri at sleppa við til DM krevst, at tú umboðar eitt danskt felag, og at tú er millum 18 tey fremstu á ranglistanum í tínum aldursbólkin.

– Hetta er sera gott høvi hjá okkara bestu ungu íðkarum at royna seg móti javngomlum rennarum úr Danmark, skrivar heimasíðan hjá Treystinum.